# Psykiatri í Føroyum á einum vegamóti

SJÓNARMIÐ
*Magnus Isaksen, sosialráðgevi á Psykiatriska Deplinum*

Í sambandi við Altjóða Psykiatridagin 10. oktober verður her hugleitt um psykiatriska arbeiðið og viðgerð í Føroyum.

Ikki fyrr enn í 1970 varð verulig psykiatrisk tænasta sett á stovn í Føroyum, sonevnda Stats-hospitalið, við Árna Olsen, yvirlækna, sum leiðara. Fyri ta tíð vóru fólk við umfatandi sinnisligari órógv viðgjørd á sjúkrahúsum í Danmark.

**Bústovnar**

Viðgerðin tá var fyrst og fremst givin á deildunum á Statshospitalinum, og bert í heilt lítlan mun vóru sosialpsykiatrisk tilboð at finna. Karolina Petersen byrjaði sum tann fyrsta at útvega bústaðir til fólk við sinnistrupulleikum og fekk í lag vistarheimið við Toftavatn og vistarheimið í Havn. Sinnisbati, stovnað í 1982, setti á stovn tvey eftirviðgerðarstøð, Sólteig og Eysturstræti. Talan var um sjálvsognarstovnar riknir við almennum pengum. Í 2001 var víst á, at í sambandi við eitt álit um bústovnar til fólk við sinnisligum trupulleikum varð gjørt, at 77 fólk høvdu brúk fyri bútilboði. Av hesum búðu 40 líðugt viðgjørd á psykiatrisku deildunum á tí, sum nú eitur Psykiatriski Depilin. Restin búði hjá familjuni. So her mátti okkurt gerast. Uppgávan at útvega fólki við sinnisligum trupulleikum búpláss, varð fyrisitingarliga samanskipað í Stuðulsfólkaskipanina fyri Vaksin og Deildina fyri Sinnisveik. Hesin stovnur eitur nú Stuðulstænastan, og er partur av Nærverkinum. Higartil eru 2 sambýli við starvsfólki alt samdøgrið sett á stovn í Sandavági. Her má sigast, at lokalsamfelagið hevur verið sera positivt móti sambýlunum. M.a. hava fleiri av búfólkunum fingið arbeiði niðursetta tíð.

Stuðulstænastan hevur eisini tikið yvir eitt sambýli á Bóndaheygi 3 í Tórshavn frá Landssjúkrahúsinum, har fólk við sinnisligum trupulleikum kunnu búgva til leigu. Eftir at Stuðulstænastan hevur yvirtikið sambýlið, hevur tað fingið navnið Sambýlið við Heyggjar. Nevnast kann í hesum sambandi, at suðuri í Vági var eitt tíðarskeið eitt sambýli, ið Vágs Býráð tók stig til. Almanna- og Heilsumálaráðið er í ferð við at byggja sambýli í Tórshavn og ein økisdepil suðuri í Vági.

**Økispsykiatri**

Tosið um økispsykiatri tók seg upp í 1980unum. Í 1987 kom Sinnisbati við uppskoti um at desentralisera psykiatrisku tænastuna í Føroyum. Her var bæði talan um bústaðir, økispsykiatri og arbeiðstilboð. Í 1989 varð August Wang, yvirlækni settur sum økissálarlækni. Seinni vóru eisini hinir yvirlæknarnir tiknir við í hetta arbeiðið. Í 1991 var psykiatriætlan skrivað, har økispsykiatri var lyklaorðið. Ætlanin var, at fleiri fakbólkar skuldu vera við í hesum arbeiði, ið skuldi vera tvørfakligt. Hendan ætlan varð ongantíð veruleiki, tí fíggjarliga kreppan kom fyrst í 1990unum. Hon hevði við sær, at allar nýhugsanir á hesum øki vórðu steðgaðar. Økispsykiatriska virksemið hjá yvirlæknunum helt tó fram til seinast í 1990unum. Høvuðsorsøkin til, at tað varð steðgað tá, var at trupult var at fáa yvirlæknar. Teir megnaðu sostatt ikki bæði at servisera psykiatrisku deildirnar og at ferðast runt í landinum.

Í hesum tíðum verður av álvara byrjað aftur við økispsykiatri. Sjúkrarøktarfrøðingar verða settir í starv á Psykiatriska Deplinum, men skulu húsast saman við heimarøktini úti í økjunum. Tær hava møguleika at brúka aðrar fakbólkar á deplinum. Hesir fakbólkar koma sostatt at arbeiða bæði á deplinum og úti í økjunum.

**Onnur tilboð**

Heilt frá byrjan av vóru aðrir fakbólkar enn læknar og røktarfólk í starvi innan psykiatrisku tænastuna, og tilboðini hava eisini verið fleiri. Men trupulleikin hevur verið samskipan. Tá so nýggj psykiatriætlan varð gjørd í 2002, bleiv hugtakið heildarpsykiatri sett í miðdepilin. Hetta merkir, at viðgerðin skal virka sum partur av eini heild og merkir eisini, at ymisku fakbólkarnir og samstarvspartarnir mugu arbeiða tætt saman og samskipa arbeiðið. Málið er, at sjúklingurin kemur í fokus, og at hann sjálvur setir orð á tað, sum hann hevur brúk fyri. Somuleiðis at avvarðandi fáa ein virknan leiklut.

Umframt tey tilboð, sum Psykiatriski Depilin hevur, hevur Stuðulstænastan eisini eina kafé í Løkjatúni 1 á Argjum. Kaféin virkar sum tilhaldsstað fyri fólk við sinnistrupulleikum, har tey saman við stuðlum kunnu skipa fyri ymiskum tiltøkum. Arbeitt verður við at skipa líknandi tilhaldsstøð kring alt landið. Harumframt hevur Stuðulstænastan eitt stuðulstoymi, sum fer út í heimini hjá brúkarunum og veitir sosialpedagogiskan stuðul.

ALV verkstaðið í Havn hevur fleiri fólk við sinnisligum trupulleikum bæði í arbeiðsroynd og í vardum arbeiði. ALV hevur eisini ætlanir um at fremja eina størri verkætlan í Eysturoynni, har psykiatrisku brúkararnir vónandi eisini kunnu fáa arbeiði. Somuleiðis hava fleiri fingið gleði av ALV skúlanum við Áir, har møguleiki m.a. er at uppfríska sín kunnleika og at taka 9. flokk fólkaskúlans.

**Sjúkrahúspsykiatri**

Síðani psykiatrisku deildirnar vóru bygdar umleið 1970 er lítið gjørt fyri at halda tær viðlíka. Tey seinastu árini hevur ein upphædd verið sett á fíggjarlógina til renovering av Landssjúkrahúsinum. Túrurin er nú komin til Psykiatrisku deildirnar. Ein arbeiðsbólkur hevur gjørt tilmæli til landsstýrismannin, ið nú skal viðgera hetta í politisku skipanini. Tað er ongin ivi um, at um psykatriska virksemið í Føroyum skal liva upp til støðið í grannalondunum, verður talan um stórar íløgur. Somuleiðis er greitt, at um talan skal verða um eina vælvirkandi og rationella heildarpsykiatri, eru hesar íløgur neyðugar.

**Psykiatrilóg**

Tann lóggávan, sum psykiatriin verður skipað eftir, stavar heilt frá 1938.

Tað hevur leingi verið tosað um, um vit skulu tillaga donsku lógina ella gera eina serstaka føroyska lóg. Nú verður tað so til tað, at danska lógin verður tillagað. Tað er eingin ivi um, at hetta verður stórt framstig, serliga fyri rættartrygdina hjá sjúklingunum. Tað skal sigast, at í praksis hevur í stóran mun verið roynt at liva upp til nútíðarkrøv á hesum øki á Psykiatriska Deplinum, men nú sær út til, at lóggáva eisini verður dagførd. Hetta er bert at fegnast um.

**Niðurstøða**

Sum skilst eru stórar avbjóðingar fyri framman, bæði fakliga við at samskipa tey tilboð, sum eru í og uttan fyri psykiatriska økið, og eisini politiskt við at fáa játtanir til at nútíðargera virksemið á Psykiatriska Deplinum og til at byggja út við bústovnum, veristøðum o.t.

Sum er, tykjast jaligir vindar at blása bæði millum tey, ið varða av psykiatriini og í tí politiska umhvørvinum. Um hetta heldur fram, hava vit um nøkur ár vónandi eina dagførda psykiatri, sum vit kunnu vera stolt av

At enda vil eg nevna, at tann vælvild, ið víst hevur verið psykiatriska økinum, m.a. hevur gjørt, at til hevur borið at fara í gongd við at eftirútbúgva fólk. Hetta hevur havt alstóran týdning fyri fakliga umhvørvið og fyri trivnaðin hjá starvsfólki í psykiatriini. Eftirútbúgvingin verður fyriskipað í samstarvi við "Psykiatrien i Århus Amt". Ein bólkur við meira enn 20 er líðugur, og tey næstu byrja eftirútbúgving nú til heystar.

# Kr. 30.260 meir til verkafólkið



JØRGEN NICLASEN
formaður Fólkafloksins

Skattalættarnir seinastu árini eru útskeldaðir, men ímyndi tykkum lættarnar fyri uttan.

Skattalættar hava stóra rúmd í politiska orðaskiftinum. Tykist nú, sum allir flokkar, uttan Fólkaflokkurin, renna undan skattalættunum. Allir hava verið við til skattalættarnar seinastu 12 árini.Tað eiga flokkarnir at verða stoltir av.

Síðan skattatrýstið toppaði í 1994 er skatturin mest sum á hvørjum ári lækkaður. Fyri at samanbera, hava vit frá fíggjarmálaráðnum fingið samanbering av hvat fólk skuldu goldið í skatti í dag, um eingin skattalætti var komin síðan 1994.

Við óbroyttum skattatrýsti hevði eitt verkafólk við 40 tíma viku skula goldið 30.260 kr meira í skatti, enn tey gera í dag. Starvsmannaløn og hondverkarar høvdu goldið 36.587 kr meira í skatti. Lág og meðalinntøkur høvdu havt uml. kr. 3.000 minni at liva fyri um mánaðin. Ein má spyrja, hevði bót verið á borðið um hetta skattatrýst framvegis var galdandi? Nei, skattalættarnir eiga vit øll at vera stolt av.

Nú skuldi ein trú, at landskassin hevði fingið nógv minni inn. Nei, hesa tíðina eru inntøkur landskassans meir enn tvífaldaðar.

**Skattalætti gevur meira vælferð**

Taka vit bert seinastu 4 árini, har samgongan hevur lækkað skattin við eini upphædd, sum svarar til 240 mió. kr. Eru inntøkur landskassans minkaðar?. Nei, tvørturímóti. Seinastu 4 árini eru inntøkur landskassans vaksnar við 1.000.000 mió. Kr. Við at nýta 240 mió til skattalætta, hava vit fingið 1 milliard í meira vælferð.

Endamálið við skattalættum er, at tað skal loysa seg at arbeiða. Fólk skulu fáa "loyvi" til at brúka eitt sindur meir av sínum egnu pengum. Vit skulu fáa búskapin at vaksa. Vøkstur gevur vælferð. Skattalætti einsamallur, kann ikki geva fullan vøkstur. Uttan skattalættan bremsa vit tí framburði vit hava. Fólkaflokkurin vil, at vøksturin skal halda fram.

# Góði Anfinn Brekkstein



HEÐIN MORTENSEN
borgarstjóri í Tórshavnar kommunu

Grýtan í Tórshavnar kommunu kókar ikki eins hart, og grýtan í Kirkjubøar-Velbastaðar kommunu gjørdi á sinni, tá tú sat sum formaður har.

Skal eg siga mína meining um støðuna tá, og tað, tú ikki kunnaði um í tíni tíð, so turrkókaði tú grýtuna uttan at koma á mál.

Nú veit eg ikki, hvussu nógv skil tú hevur fyri búskapi. Men eitt kann eg vissa teg um, og tað er, at vit, sum her stýra, kenna okkara ábyrgd og skyldur.

Vit eiga øll at frøast um, at vit eru partur av eini kommunu, sum vil nakað, ið hon eisini megnar.

Eg fái meg ikki at trúgva, at tú av fullum hjarta meinar tað, tú skrivar, nú Tórshavnar kommuna hevur útbygt alt tað fyri Vestan, sum tú í tíni formanstíð ikki megnaði, og vit nú skulu víðari við hinum partinum av kommununi.

Tú hevur uttan iva lagt merki til, at vit hava útbygt fyrrverandi Kirkjubøar-Velbastaðar kommunu nógv meira, enn avtalað varð í samanleggingarskjalinum.

Eitt kann eg vissa teg um, Anfinn Brekkstein, og tað er, at vit helma ikki í, fyrr enn vit hava eina væl útbygda kommunu við nøgdum borgarum, ið síggja eina bjarta framtíð.